rættiliga nógv ymisk brot. Fyri meg, virkaðu hesi samansettu brotini als ikki sum eitt samanhangandi lag. Men tað kann vera, at tað er ein partur av spælireglunum innan hetta slag av tónleiki.

Lagið skifti ofta frá at koyra 10 Km/h og so leyp tað uppá 353 Km/h. Hóast ljóðið var rættiliga klárt og gott, tóktist ljóðmyndin ógreið. Hetta tí, at sjálvt um ein bólkur leggur seg eftir at spæla óruddiligt og ófantaligt, so skal hetta eisini gerast ordiligt. Og tað haldi eg ikki, at Synarchy megnaði hetta kvøld.

Nakað heilt annað er, at sangarin, Leon B. Hansson, hevur eina ófatiliga orkumikla rødd. Hann telist óivað millum teir bestu "growlarnar" í Føroyum.

## Marius

Stórfavorittarnir, Marius, áttu síðan tørn. Teir vóru sera sannførandi í tí innleiðandi umfarinum, og tí vóru teir eitt gott boð uppá ein møguligan vinnara. Og framførslan leygarkvøldið var so sanniliga eisini sannførandi.

Tá ið teir spældu, gjørdist munurin millum tey betru og tey minnið góðu sera greiður. Marius vóru beinleiðis klassar omanfyri bólkarnir sum høvdu framført frammanundan. Teir fáa tónleikin upp at svinga, og kompositiónirnar eru nógv meir gjøgnumførdar. Bólkurin prógvaði sostatt, at tað var av røttum, at hann varð skírdur favorittur.

Marius spælir meiri við tann dynamiska partinum av tónleikinum, enn bólkarnir frammanundan gjørdi tað. Tað tykist sum teir hava nógv fleiri gear. Og hóast eg taldi 6 streingir á gittarinum, høvdu teir fleiri streingir at spæla uppá.

Løgini "Now is here" og "Watching the stars asleep" fingu veruligt lív í fjøldina, og oddamaðurin Hans Marius, dugdi væl at gagnnýta hetta samband við áhoyrarin. Tað er eyðsæð at bólkurin er mannaður við dugnaligum tónleikarum. Heðin Ziska er genialur gittarleikari. Hann fyllur nógv út í ljóðmyndini, og dugur sera væl at litað tónleikin.

## Boys in a Band

Ongin ivi er um, at Føroyar hava fingið ein nýggjan vælumtóktan bólk. Boys in a Band debuterðau fríggjakvøldið, og longu leygarkvøldið vóru teir puplikumsfavorittar. Bólkurin spælir eitt slag av veitslupoppið sum vit kenna umvegis Frans Ferdinand, Artic Monkies og tílíkar bólkar. Boys in a Band eru meiri enn tónleikur. Teir hava eina greiða og tilrættislagda útsjónd, og teir leggja seg eftir at gera eitt veruligt show. Tónleikurin er títtur og skemtingarsamur, og tú má bara lata fótin vippa afturvið. Boys in a Band vóru avgjørt tað størsta jaliga yvirraskilsi á GBOB 2006.

Hóast kompositiónirnar ikki stóðu so sterkar, svingaði tónleikurin væl.

Tónleikarnir eru dugnaligir hvør sær, men eg haldi tó, at sangarin, Pætur Zachariassen, onkuntíð gjørdi ov nógv burturúr at flippa út, soleiðis at sangframførslan datt í aðru røð.

Boys in a Band fara óivað at verða sera virknir í komandi festivalum, og er hetta gleðiligt. Tó haldi eg, at teir skulu hava í huga, at tað sum teir spæla, ikki er serliga orginalt og nýskapandi – men feitt er tað!

## Deja Vu

Saman við Marius vóru tey mong ið skírdu Deja Vu sum favoritt at vinna føroyska partin av GBOB. Við sínum "skeiva" popp/rokk tónleiki framførdu teir eina minniliga konsert. Teir løgdu út við lagnum "Wake you up". Hetta lagið er longu blivið eitt undirgrundshit millum fjepparar, hóast tað ikki er útgivið enn.

Teirra samanspæl er ógvuliga kontrolerað. Teir eru sera nærlagdur við smálutirnar í tónleikinum, og tískil fært tú sum áhoyrari eina sera greiða og týðiliga ljóðmynd frá pallinum. At teir eisini leggja seg eftir, at útseta løgini rættiliga alternativt, er eisini bara at gleðast um. Serliga haldi eg at botnurin í bólkinum er áhugaverdur. Botnurin er sera virkin (kanska ov virkin?), soleiðis at løgini allatíð eru áhugaverd. Onkur hevur onkuntíð sagt, at botnurin stressar løgini ov nógv. Men eg meti at bólkurin meistrar hetta væl. Ein onnur styrkja við bólkinum eru teir báðir vokalarnir. Líggjas og Flóvin klinga ófatiliga væl saman, og lyfta støðið á tónleikinum. Á GBOB var tað Líggjas ið sang tað mesta, og hesum slapp hann eisini heilt væl frá.

Á pallinum eru limirnir sterkar persónligheitir at síggja til. Teir liva seg inn í tónleikin, og hetta hjálpir tær sum áhoyrara at ferðast við tónleikinum. Samanumtikið stóð Deja Vu fyri eini frálíkari framførslu.

Seinna lagið hjá Deja Vu varð lagið "Reckless". Hetta lag varð ognað Rasmus Rasmussen, og vórðu áhoyrararnir glaðir fyri hesa heilsan.

Nú fóru dómararnir at telja saman atkvøður, soleiðis at ein vinnari kundi skírast. Og úrslitið gjørdist, 1. Deja Vu, 2. Boys in a Band og 3. Marius. Ein gjørdist bilsin tá ið Boys in a Band vórðu kunngjørdir at lenda á 2. plássið. Tey mundu verða fá sum høvdu roknað við, at Boys in a Band skuldi enda omanfyri Marius, men hin vegin, so er tað bara stuttligt, at ein so nýggjur bólkur kann megna tað. Tað tóktist tó ikki at verða nøkur ónøgd um, at Deja Vu fór avstað við sigrinum.

Frá Sosialinum ynskja vit Deja Vu hjartaliga tillukku, og ynskja teimum góða eydnu í London.







